# Realskúlamynd frá 1964



Mynd frá ”Realskúlaframsýningini 1916-66”, sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í summar. Myndin her er av realskúlanæmingum í 1964.

**Aftara rað f.v.:** Per Persson og Ása Sørensen (á Mýrini).

**Fremra rað f.v.:** Elsa Mortensen, Dagbjartur Johansen, Kristina Abrahamsen og Herman í Stórustovu.

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024.

(Mynd nr. 496).

*Myndaeigari: Jógvan Christiansen*

# Evangeliskt tiltak í Vestmanna



Eitt evangeliskt tiltak verður í Auluni í skúlanum í Vestmanna vikuskiftið 11.-13. apríl.

Byrjað verður fríggjakvøldið 11. apríl kl. 20 har eitt mannskór fer at luttaka. Eitt kór, sum er samansett av monnum úr ymiskum samkomum í Tórshavnar Kommunu og er stjørnað av Eli Smith. Hetta kórið bleiv serliga kent undir tí stóru samfelagsstevnuni í november í fjør, har teir bergtóku eina stúgvandi fulla høll á Nabb í Havn.

Leygarkvøldið 12 apríl kl. 20 heldur møtirøðin fram, og tá fara Jógvan Mortensen og Co. at luttaka. Teir eru kendir frá størri møtitiltøkum kring landið, men mest kendir frá møtunum, sum plaga at vera í badmintonhøllini í Klaksvík. Teir hava ein serliga lættan og »íoyrafallandi« stíl.

Sunnukvøldið 13. apríl kl. 18 endar møtirøðin har eisini kendar sangkreftir luttaka. Talarar hesi kvøldini vera m.a. Rógvi Joensen, David Lukama, Jákup Hansen, Marius Sørensen og Bogi Simonsen. Ein kaffimunnur verður at fáa aftaná hvørt møti, har høvið er at samtala og at fáa forbøn. Fyrireikarnir vóna at síggja so mong sum tilber til hesa møtirøð.



## Dópsdøgurði á Beinisvørði

*Torgerð Suðuroy*

Við hesum vil eg takka manning á Smyrli og Strandferðsluni fyri óføra tænastu, tá vit leygardagin 29. mars høvdu dópsdøgurða umborð á góðu matstovuni á Smyrli, ið nevnist Beinisvørð. Eftir dópin, sum fór fram í Hoyvík, fóru vit umborð á Smyril um 13 tíðina at eta. Vit vóru yvir 30 fólk. Matskráin var frálík, 3 rættir, og maturin var frálíkur, og tænastan var sera góð, so hetta er avgjørt ein tænasta, ið fleiri áttu at roynt. Hervið tøkk til tykkara, ynskir Torgerð Omman.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Lesið Sosialin -so eru tit við!